# VINNUSÍÐURNAR

SAMBAND
JAN MÜLLER
JAN@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Møguleikarnir í Hoyvíkssáttmálanum

ÍSLAND
*Óli Jacobsen*
*oli@sosialurin.fo*

Seinasta vikuskiftið skipaði føroyska sjómansheimið í Reykjavík, Ørkin, fyri einum áhugaverdum og fjølbroyttum tiltaki, sum skuldi seta fokus á viðurskiftini millum Føroyar og Ísland og teir møguleikar, sum liggja í Hoyvíkssáttmálanum.

Tiltakið byrjaði fríggjadagin Kl 17, tá myndlistaframsýning lat upp við listarverkum hjá Kartin Olgar Lamhauge, Sigrun Gunnarsdóttir og Jógvan Purkhus. Jógvan er klaksvíkingur, sum býr í Íslandi. Hann er tí ikki so kendur í Føroyun. Men sum skyldmaður hjá Hans Hansen úr Mikladali og beiggi Páll Purkhús skuldi ligið væl fyri! Danski sendiharrin í Íslandi opnaði framsýningina.

Sjálv ráðstevnan byrjar leygarmorgunin við fiskivinnuni. Olaf Olsen vísti á sínar royndir Íslandi og við íslendingum og Óli Jacobsen greiddi frá lagnufelagsskapinum millum Føroyar og Ísland.

Halldór Pálsson, íslendskur handilsmaður, samanbar føroyingar og íslendingar, og Águst Steintórsson greiddi frá byggivinnuni í Íslandi.

Seinnapartin greiddu Atlantic Airways og Dánjal Poulsen frá Faroe Travel frá ferðamøguleikum millum Føroyar og Ísland, og Maigun Solmunde greiddi frá íslendsku ferðavinnuni og møguleikar fyri at útbúgva seg har.

Almenna skráin fyri ráðstevnuna endaði leygardagin við vitjan á Smyril-Line og Rumfatalagerinn í Kópavogi.

### Onnur tiltøk

Leygarkvøldið var føroysk gospelkonsert í Filadelfia, har tað var samsending við Lindina í Íslandi og Føroyum. Bólkarnir vóru SALT og Terji og Lisa. Hesir bólkar vóru eisini við øðrum tiltøkum.

Sosialurin var við í hesum tiltaki, og fara vit í blaðnum í dag og komandi bløðum at greiða frá ráðstevnuni, eins og vit fara at hava annað áhugavert tilfar úr Íslandi.




*Hendan myndin er tikin frá samkomuhúsinum Akurinn, har Brøðrasamkoman heldur til. Tann stóri bygningurin er tann hjá Rúmfatalagerinn. Ein stórur partur verður brúktur til handil hjá teimum sjálvum, men leigað verður eisini út til onnur endamál. Til vinstru í myndimi sæst eini hús í gerð. Hetta er "Føroyatornið", sum tað verður kallað. Tað skal hava einar 20 hæddir og verða eitt tað hægsta hús í Íslandi. Tað skal leigast út til skrivstovur. Ætlanin er at gera ein brúgv millum bæði húsini.*




# Partabrøv komu fyri seg

MARKNAÐARRÁK

Farna vika var betri hjá partabrævaíleggjarum. Partabrøv um allan heim komu fyri seg í farnu viku, eftir lækkingar á 6%-8% vikuna áðrenn. Soleiðis hækkaðu alheims partabrøv í miðal um 2% í vikuni. Norðurlendsk partabrøv hækkaðu 3,5%. Av tí at norðurlendski marknaðurin er væl minni enn til dømis tann evropiski, flytir hann seg oftast meir enn størru marknaðirnir, bæði tá tað gongur upp og tá tað gongur niður. Kaupthing metir, at langtíðar rákið við hægri partabrævakursum er óbroytt. Tó kunnu kursirnir lækka nakað aftrat, áðrenn vit av álvara halda á við langtíðar hækkingini.

### Dollarin nærkast vegamóti

Hesa farnu vikuna viknaði dollarin eitt vet, úr 5,69 í 5,66 kr. Hetta var áhugavert, eftirsum bæði amerikonsk partabrøv og rentur hækkaðu í vikuni. Tá renturnar hækka, stuðlar hetta sum oftast undir gjaldoyranum, eftirsum íleggjarar ofta fegnir vilja flyta pening til lond við høgari rentu. Dollarin er fyri tað mesta viknaður síðan 2001, og hann nærkast tí veikasta, hann hevur verið síðan 1995. Tá var hann beint undir 5,40 og vendi. Tá nú hvørki partabrøv ella rentur fingu dollaran at styrkna, eru útlit fyri, at hann kann vikna enn meira. Áhugavert verður at vita, um hann í fyrstu atløgu viknar niður á 5,50.

### Lánsbrævarentur hækkaðar eitt sindur

Lánsbrævarentur eru hækkaðar nakað aftur hesa farnu vikuna. Serliga var tað betraða amerikanska arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin, ið elvdi til hækkandi rentur. 10-ára rentan er nú 3,95%. 1-árs rentan er 4,28%.

### Hesa vikuna

Hesa vikuna fer framhaldandi at verða dúgliga gitt, um partabrøv longu skulu uppaftur, ella um vit mugu brynja okkum við toli. Hetta fer at hanga saman við metingum um serliga amerikanska búskapin. Tí eru amerikonsku prísvakstrartølini, sum koma fríggjadagin, av stórum týdningi fyri allar marknaðir.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 564,84 | -0,7% |
| JPY | 4,80 | -2,5% |
| GBP | 1.091,58 | -0,1% |
| NOK | 92,09 | 1,2% |
| SEK | 80,14 | 0,1% |

**Virðisbrøv**

| Norrøn | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 98,62 | 0,0% |
| Norrøn Partabrøv | 128,47 | 2,4% |
| **VMF** | **Kursur** | **+/- %** |
| Atlantic Petroleum | 617,50 | 6,0% |
| KB Trygg Eurostoxx | 106,92 | 1,0% |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*